LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 6. oktober 2023
J.Nr.: LUM-00- 23/10909-21
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um avgerð hjá Tórshavnar kommunu um at geva einum starvsfólki eina ávaring

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um eina ávaring, ið Tórshavnar kommuna hevði latið einum starvsfólki hjá kommununi. Umboðsmaðurin helt, at soleiðis sum ávaringin var orðað, leyk hon ikki kravið um greidleika. Umboðsmaðurin helt eisini, at Tórshavnar kommuna í ávaringini ikki hevði víst á slík faktisk viðurskifti, ið góvu umboðsmanninum orsøk at halda, at starvsfólkið hevði brotið sína lýdnisskyldu. Umboðsmaðurin heitti á Tórshavnar kommunu, um at endurskoða avgerðina at geva viðkomandi starvsfólki eina ávaring og lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

## 2. Klagan

Við skrivi, dagfest 11. mai 2023 hevur Havnar Arbeiðarafelag sent umboðsmanninum klagu vegna lim teirra A.

Saman við klaguni sendi Havnar Arbeiðarafelag umboðsmanninum skjøl, ið eru tikin við í klagumálsviðgerðina, í tann mun tey eru viðkomandi.

Klagan er endurgivin í mun til tað, ið umboðsmaðurin hevur mett viðkomandi fyri klagumálsviðgerðina:

> "Vegna lim okkara A skulu vit heita á umboðsmannin um at taka upp málið í sambandi við, at Tórshavnar Kommuna við skrivi tann 17.01.2023 hevur boðað frá, at tey geva A, sum er í starvi hjá kommununi, eina ávaring.
>
> ...
>
> Grundgevingin hjá kommununi
>
> Í hoyringsskrivinum dagfest 8. november 2022 skrivar kommunan á síðu 2:
>
> "Ætlanin um at geva tær eina ávaring er grundað á, at tú ikki virðir tín leiðara ... Mátin tú samskiftir uppá er niðurbrótandi í mun til tað álit og samstarv, ið tú skalt hava millum starvsfelagar og leiðslu".
>
> Í skrivi dagfest 21. desember 2022 endurtekur kommunan á síðu 2, at:

“Tað er eingin loyna, at viðurskiftini ..., í mun til samskifti millum B og álitisumboð, ikki hevur verið nøktandi”

Vit halda ikki at kommunan, sæð í mun til verandi málburð á arbeiðsplássinum, hevði heimild at lata A eina ávaring, í hvussu so er ikki uttan fyrst at taka eina starvsfólkasamrøðu við A, har veruligu viðurskiftini á arbeiðsplássinum vórðu lýst, m.a. um tær arbeiðsumstøður, sum menninir arbeiða undir, og við tí hugburði og málburði, sum leiðarin sum umboð fyri kommununa vísti monnunum.

...

Grundgevingin hjá kommununi

Í hoyringsskrivinum dagfest 8. november 2022 skrivar kommunan á síðu 2:

“Ætlanin um at geva tær eina ávaring er grundað á, at tú ikki virðir tín leiðara... Mátin tú samskiftir uppá er niðurbrótandi í mun til tað álit og samstarv, ið tú skalt hava millum starvsfelagar og leiðslu”.

Vit hava út frá hesari grundgeving tykkara, t.v.s. skuldseting um, at A ikki virðir sín leiðara og at hann samskiftir upp á ein máta, sum er niðurbrótandi, viðgjørt ætlan tykkara um at geva A ávaring.

Vit halda ikki at hesar grundgevingar halda, tá talan er um eina formliga ávaring.

Tali og skrivifrælsi

Vit halda fast við, at tá umsitingin hjá Tórshavnar Kommunu greitt hevur víst, at kommunan ikki vil virða grundlógartryggjaða talufrælsi hjá A sum starvsfólk hjá kommununi.

...

Hóast kommunan í skrivinum frá 21. desember 2022 skrivar, at kommunan virðir talufrælsi hjá A, so skrivar kommunan í hoyringsskrivinum 8. november 2022 m.a.:

“Ónøgdsemi við eitthvørt skal altíð fyrst verða rættað beinleiðis til leiðaran og ikki uttan um viðkomandi”.

Hvussu samsvarar hetta so við galdandi rættarstøðu? Kann ein kommuna geva starvsfólkum sínum boð um altíð at brúka ávísan kommandoveg ella er slík fráboðan tað sama sum at royna at skerja grundlógaðartryggjaða tali- og skrivifrælsi?

...

Málburðurin hjá A

A viðurkennur ikki at hann hevði noktað at gera arbeiði sítt, men rætt er at allir menninir, og felag okkara við, hava drøftað hvørja skyldu teir hava at arbeiða um kommunan ikki vildi gjalda yvirtíðarlønina fyri arbeiði leygardag og sunnudag.

A viðurkennur at hann hevur upplýst fyri leiðaranum, at hann metir at leiðarin ikki er egnaður til sína uppgávu.

Hetta er tó ikki annað enn tað sum longu varð greitt frá á fundinum 8. juni 2022 og aftur á fundinum 20. juni 2022, og vit halda fast við, at tað ikki er brot á nakra tænastuskyldu, at A segði við leiðaran, at hann ikki metti at hann er egnaður til sína uppgávu.

Hetta sjónarmið okkara er stuðlað av løgfrøðiligu rættarstøðuni, bæði fyri starvsfólk hjá landi og kommunum, og hjá álitisfólkum.

...

Samanumtikið er greitt, at tey úttalilsi, sum A er komin við ikki kunnu geva grundarlag fyri einari ávaring.

...”

## 3. Málslýsing

Tann 8. november 2022 fekk A hoyringsskriv um ávaring. Hoyringsskrivið er ikki endurgivið í hesum áliti, tí innihaldið í hoyringsskrivinum neyvt samsvarar við avgerðina um ávaring, ið er endurgivin niðanfyri í fullari longd:

Tann 17. januar 2023 var soljóðandi avgerð um ávaring frá Tórshavnar kommunu stílað A:

**“Avgerð um ávaring**

Við hesum verður sagt frá, at Tórshavnar kommuna fer at geva tær eina ávaring fyri atburð tín sum starvsfólk og álitisfólk...

Áðrenn henda avgerð er tikin hevur tú havt møguleika til at gera viðmerkingar til ætlaðu avgerðina. Víst verður til hoyringarskriv, dagfest 8. november 2022, har umstøðurnar í málinum eru lýstar og grundgivið er fyri ætlanini um at geva tær eina ávaring.

Havnar Arbeiðarafelag hevur gjørt viðmerkingar til ætlanarskrivið 21. november 2022 og 20. desember 2022.

Tórshavnar kommuna hevur í skrivi 21. desember 2022 viðgjørt viðmerkingarnar og um somu tíð givið partinum innlit í øll skjøl í málinum, sum liggja til grundar fyri hoyringarskrivinum, ið var handað 8. november 2022.

Havnar Arbeiðarafelag hevur í skrivi 29. desember 2022 biðið um at fáa longda freist til at svara viðmerkingunum frá Tórshavnar kommunu 21. desember 2022.

Viðmerkingarnar frá Havnar Arbeiðarafelag til hoyringarskrivið geva ikki Tórshavnar kommunu grundarlag fyri at broyta avgerðina um at geva tær eina ávaring.

Avgerðin um at geva tær eina ávaring, er grundað á tað sum er lýst í hoyringarskrivinum frá 8. november 2022.

*Grundgeving fyri ávaringini*

Tú byrjaði í starvi sum verkamaður ... hjá Tórshavnar kommunu tann 1. mai 2020. Tú er settur sambært sáttmála við Havnar Arbeiðarafelag. Tú er harumframt álitisfólk fyri limirnar hjá Havnar Arbeiðarafelag, ið starvast á ...

Tórshavnar kommuna hevur í longri tíð havt sjóneykuna á ... í mun til, hvussu verkafólkið skrásetir sær tímar, tí tað vísir seg, at verkafólkið skrásetir rættiliga nógvar tímar útyvir tí vanligu arbeiðstíðina, ið er frá 8-16.

Í hesum tíðarskeiðinum hevur tú víst ein sera ódámligan og lítið virðiligan samskiftishátt mótvegis B, ið kom í starv í mars 2022, har hann m.a. hevur fingið álagt at leiða og fordeila arbeiðið ..., harumframt eisini halda eitt neyvari eyga við tímaskrásetingunum.

- Tú góðtekur ikki, at B ger sítt arbeiði.
- Tú hevur sagt við B, at hann ikki er egnaður til sína uppgávu, hetta meðan tekniski stjórin var hjástaddur.

Tórshavnar kommuna góðtekur ikki slíkan atburð.

- Tú sýtir at gera títt arbeiði, um tú ikki fær tað, tú hevur skrásett tær av tímum, væl vitandi, at teir yvirtímar tú hevur skrivað tær í roynd og veru eru tímar, ið eiga at verða álagdir av B.
- Tú gert ikki eftir teimum boðum, tú hevur fingið.

Tú hevur eisini fingið skrivlig boð við freist, um at greiða leiðsluni nærri frá, hvat tað er fyri yvirtíð, tú hevur skrivað tær. Tórshavnar kommuna hevur ikki frætt frá tær hesum viðvíkjandi. Hetta er sera álvarsamt.

Starvsfólk og leiðsla hava bæði ábyrgd av, at samstarvið á arbeiðsplássinum er gott og hevur tað stóran týdning fyri trivnaðin, at álit er millum partarnar. Báðir partar eiga at arbeiða fyri einum virðiligum og siðiligum samstarvi og samskifti. Álitisfólkið hevur ein serstakan leiklut í mun til at tryggja góð viðurskifti millum leiðslu og starvsfólk. Viðkomandi er eisini at nevna loyalitetsskylduna, ið er ein av týðandi skyldunum hjá einum starvsfólki mótvegis leiðsluni. Ónøgdsemi við eitthvørt skal altíð fyrst verða rættað beinleiðis til leiðaran og ikki uttanum viðkomandi.

Ætlanin um at geva tær eina ávaring er grundað á, at tú ikki virðir tín leiðara .... Mátin tú samskiftir uppá er niðurbrótandi í mun til tað álit og samstarv, ið tú skalt hava millum starvsfelagar og leiðsluna. Tú mást broyta tín samskiftishátt at samstarva uppá, um tú framhaldandi skal arbeiða á ...

Greitt er, at tú hevur rætt til at venda tær til felagið hjá tær, um ivamál og rættindi viðvíkjandi lønar- og setanarviðurskiftum, men tú eigur fyrst at royna at fáa greiðu á hesum viðurskiftum á staðnum og í góðum samstarvsanda við leiðslu og starvsfelagar. Í sambandi við ætlanina um at geva tær eina ávaring, er eisini dentur lagdur á, at tú er álitisfólk, tí tað hvílur ein størri ábyrgd á einum álitisfólki at arbeiða fyri góðum samstarvi.

Mett verður ikki, at atburður tín livir upp til tað, ið verður væntað av einum starvsfólki og als ikki av einum álitisfólki, og tí skal vera sagt frá, at endurtekur líknandi atburður seg, kann tað føra til, at tað verða tikin stig til at siga teg úr starvi beinanvegin.
..."

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 22. mai 2023, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis. Samstundis varð Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 7. juni 2023 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum viðmerkingar.

Viðmerkingarnar eru endurgivnar í mun til tað, ið umboðsmaðurin hevur mett viðkomandi fyri klagumálsviðgerðina:

"Frágreiðing viðv. klagu um skrivliga ávaring til A, álitisumboð fyri verkafólkið á ...

Víst verður til skriv tykkara, dagfest 22. mai 2023, har biðið verður um frágreiðing um viðgerðina av málinum viðvíkjandi ávaring til A, verkafólk og álitisumboð, umframt skjølini í málinum.

Málsgongd.
Í mars 2022 varð B settur í starv ...

Stutta tíð eftir hetta, í juni 2022, møtti verkafólkini upp á fund við borgarstjóran, um vantandi trivnað ... eftir at B varð settur í starv.

Tórshavnar kommuna fór beinanvegin í holt við at kanna hetta nærri og hevði eisini fund við B um vantandi trivna.

Í hesum sambandi kom fram, at verkafólkini skrivaðu sær yvirtímar, sum B setti spurnartekin við. Hetta førdi til stórt ónøgdsemi.

Tórshavnar kommuna setti sær fyri at kanna hvør orsøkin var til, at verkafólkini skrivaðu sær sjálvum so nógvar yvirtímar.

19. oktober 2022 fingu verkafólkini skriv handað frá Tórshavnar kommunu, har biðið varð um at fáa eina nærri lýsing og nágreining av, hví teir høvdu skrivað sær so nógvar yvirtímar...

Skrivið varð handað 3 verkafólkum, ið høvdu starvast hesar vikurnar ... Ein av teimum var A.

...

Freistin at koma við einum svari var 26. oktober 2022.

Tórshavnar kommuna frætti ongantíð aftur frá verkafólkunum í mun til at koma við frágreiðing um yvirtímarnar.

21. oktober 2022 kom Havnar Arbeiðarafelag inn í málið við fulltrú frá teimum 4 verkafólkunum, ið starvast á ...

...

21. november 2022 hevur Tórshavnar kommuna móttikið viðmerkingar til hoyringsskrivið frá Havnar Arbeiðarafelag, har tað staðiliga verður víst aftur at geva A ávaring. Harumframt varð biðið um skjalainnlit.

21. desember 2022 gav Tórshavnar kommuna skjalainnlit og viðmerkingar til Havnar Arbeiðarafelag, har Tórshavnar kommuna bað Havnar Arbeiðarafelag um umbering fyri ikki at hava svarað stundisliga.

29. desember 2022 bað Havnar Arbeiðarafelag um at fáa møguleika fyri at útseta svarfreistina til 16. januar 2023 grundað á, at Tórshavnar kommuna ikki svaraði innan tíðarfreistina í fyrisitingarlógini.

29. desember 2022 játtaði Tórshavnar kommuna, at freistin at svara varð sett til 16. januar 2023.

Ábyrgdin fyri drálinum er á Starvsfólkadeildini. Viðmerkingarnar vóru klárar at senda út til tíðina, men grundað á eina misskiljing um hvør skuldi undirskriva, kom drál í.

12. januar 2023 hevur Tórshavnar kommuna móttikið endaligu viðmerkingarnar frá Havnar Arbeiðarafelag.

Viðmerkingar til klaguna frá Havnar Arbeiðarafelag til LUM

Tórshavnar kommuna kennir seg ikki aftur í at hava framt ágang móti verkafólkinum.
Tórshavnar kommuna hevur hinvegin framt leiðslurættin í verki.

Grundgevingin fyri at geva A eina ávaring eru hesar:

- A hevur víst ein ódámligan og óvirðiligan samskiftisshátt mótvegis B. Tórshavnar kommuna hevur álagt B at leiða og fordeila arbeiðið ..., harumframt halda eitt neyvari eyga við tímaskrásetingunum.
- A virðir og góðtekur ikki, at B hevur fingið til uppgávu at leiða og fordeila arbeiðið .... Hann hevur beinleiðis sagt við B, at hann ikki megnar sítt arbeiði. Hetta hevur hann sagt, meðan tekniski stjórin var til staðar.
- Harumframt hevur A áhaldandi sýtt fyri at gera sítt arbeiði, um hann ikki fær teir tímar, hann sjálvur hevur skrásett sær, hóast hann hevur fingið at vita, at hann bara skal skráseta tímar hann hevur arbeitt og yvirtímar skulu bara verða skrásettir, um teir eru álagdir av B einst og tað eisini framgongur av sáttmálanum. Hesi boðini aktar hann ikki og gongur sostatt á odda fyri at gera ímóti tí leiðslan hevur álagt.
- Ein meir orsøk til, at Tórshavnar kommuna metti, at A skuldi hava eina ávaring var, at hann eisini er álitisumboð.

Sum tað framgongur av avgerðarskrivinum um ávaring, verður víst á, at Havnar Arbeiðarafelag hevur gjørt eina avtalu, í mun til álitisfólkaskipan, har reglur um rættindi og skyldur hjá álitisfólkum eru ásettar.

Eitt av aðalmálunum við álitisfólkaskipanini er at umboða starvsfólkini í samskiftinum við leiðsluna og skal álitisfólkið gera sítt til, at arbeiði fer siðiliga fram. Eisini skal álitisfólkið virka fyri best møguligum samstarvi limanna og leiðslunnar millum, sbrt. pkt. 5 í avtaluni.

Álitsfólk eru meira vard, tá talan er um eitthvørt í mun til starvsviðurskifti, men um somu tíð hevur álitisumboðið hinvegin eisini eina ábyrgd og skyldu til at fara siðiliga og virðiliga fram í orði og verki. Tey hava júst fingið litið tað álit upp í hendi, at verða álitisumboð og tað pliktar.

Eitt álitisumboð hevur rætt til at leggja tilmæli og uppskot fyri leiðsluna, men síðuleypandi hevur álitisumboðið eina serliga plikt til at virða avgerðir, ið leiðslan hevur tikið og loyalt arbeiða fyri, at hetta kann gerast í verki.

Viðmerkingarnar frá Havnar Arbeiðarafelag hava ikki givið Tórshavnar kommunu grundarlag fyri at broyta avgerðina um at geva A eina ávaring.
..."

Saman við frágreiðingini, dagfest 7. juni 2023, sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum skjøl. Hesi skjøl eru viðgjørd í brotinum "Niðurstøða" í tann mun tey eru viðkomandi fyri klagumálsviðgerðina.

Við skrivi, dagfest 28. juni 2023, vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 7. juli 2023 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar.

Viðmerkingarnar eru endurgivnar í mun til tað, ið umboðsmaðurin hevur mett viðkomandi.

> “Viðv. kæruni vegna A um málsviðgerðina hjá Tórshavnar Kommunu í sambandi við ávaring.
>
> Vit hava fingið avrit av skrivinum, sum Tórshavnar Kommuna sendi umboðsmanninum 7. juni 2023.
>
> ...
>
> **<u>Hvat snýr kæran seg um</u>**
>
> …
>
> Kæran snýr seg um fyrisitingarligu málsviðgerðina hjá kommununi, soleiðis sum hetta er lýst í kæru okkara.
>
> **<u>Frágreiðingin frá kommununi um veruligu gongdina í málinum.</u>**
>
> Kommunan skrivar rættuliga nógv um arbeiðsviðurskiftini ... og kemur so inn á grundgevingina fyri ávaringini.
>
> Vit skulu tó gera vart við, at bæði A og starvsfelagar hansara vísa á, at avgerandi skeivleikar eru í frágreiðingini hjá kommununi um veruligu umstøðurnar í málinum.
>
> Serliga kunnu vit vísa á:
>
> - <u>At</u> tað ikki er rætt, at A hevur brúkt ein samskiftishátt, sum er øðrvísi enn B alla tíðina hevur brúkt,
> - <u>At</u> tað ikki er rætt, at A ikki góðtekur at B hevur fingið til uppgávu at leiða og fordeila arbeiðið.
> - <u>At</u> tað ikki er brot á tænastuskylduna, at gera vart við, at A ikki metir at B megnar uppgávu sína,
> - <u>At</u> A ongantíð hevur lagt niður arbeiði sítt, um hann ikki fekk lønina fyri teir tímar, sum hann hevði noterað. Hetta kunnu starvsfelagirnir eisini vátta. Her kann eisini viðmerkjast, at kommunan nú hevur váttað, at menninir, m.a. A ikki høvdu fingið lønina, sum teir høvdu rætt til fyri yvirtíðarbeiði teirra, og kommunan hevur játtað at gjalda øllum monnunum hesa lønareftirstøðu
> - <u>At</u> tað er ein heilt grundleggjandi skylda hjá A sum álitismanni, at vísa á tá hann og starvsfelagirnir ikki fingu røttu lønina, í hesum førinum eina løn sum kommunan seinni hevur viðurkent at vilja gjalda.
>
> ...”

Tann 15. august 2023, sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu skriv, har umboðsmaðurin ynskti, at Tórshavnar kommuna gav sínar viðmerkingar til soljóðandi viðmerkingar frá Havnar Arbeiðarafelag, dagfestar 7. juli 2023:

> “<u>At</u> A ongantíð hevur lagt niður arbeiði sítt, um hann ikki fekk lønina fyri teir tímar, sum hann hevði noterað. Hetta kunnu starvsfelagirnir eisini vátta. Her kann eisini viðmerkjast, at kommunan nú hevur váttað, at menninir, m.a. A ikki høvdu fingið lønina, sum teir høvdu rætt til fyri yvuirtíðararbeiði teirra, og kommunan hevur játtað at gjalda øllum monnunum hesa lønareftirstøðu”

Tann 17. august sendi Havnar Arbeiðarafelag umboðsmanninum fleiri viðmerkingar. Umboðsmaðurin hevur valt ikki at endurgeva hesar viðmerkingar, tí tær lýsa viðurskifti, ið eru nøktandi lýst aðrastaðni í álitinum.

Tann 11. september 2023 sendi Tórshavnar kommuna svar til skrivið, ið umboðsmaðurin sendi kommununi tann 15. august 2023.

Í skrivinum greiðir Tórshavnar kommuna millum annað soleiðis frá:

> "Tórshavnar kommuna kann taka undir við, at A ikki beinleiðis hevur niðurlagt arbeiðið. Hann hevur hinvegin fleiri ferðir, sum álitisumboð, eisini aftaná hann hevði fingið hoyringarskriv um ávaring, gingið á odda fyri at forða fyri at gera tað arbeiði, honum varð álagt og soleiðis hindrað, at arbeiði kundi fara fram uttan stórvegis hóvaslák..."

## 5. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum klagumáli er á skrivligum grundarlagi og tekur støði í tí skjalatilfari, ið Tórshavnar kommuna og Havnar Arbeiðarafelag hava latið mær í sambandi við viðgerðina av hesum máli.

Í avgerðini um ávaring, dagfest 17. januar 2023, ið er endurgivin omanfyri undir "Málslýsing" stendur soleiðis:

> "...
> Avgerðin um at geva tær eina ávaring, er grundað á tað sum er lýst í hoyringarskrivinum frá 8. november 2022.
> ..."

Av hesum ávum er klagumálsviðgerðin hjá mær avmarkað til ta skjalatilfar, ið eg havi fingið útflýggjað, sum fevnir um tíðarskeiðið áðrenn 8. november 2022.

Eg havi tískil ikki viðgjørt útflýggjað skjalatilfar frá Tórshavnar kommunu og Havnar Arbeiðarafelag, ið fevnir um tíðarskeiðið aftaná 8. november 2022.

Tey formligu setanarrættarligu krøvini til eina ávaring eru ikki skipaði í fyrisitingarlógini ella aðrari lóggávu, men stava úr dómsvenju.

Ein ávaring er eitt setanarrættarligt amboð hjá einum arbeiðsgevara og er vanliga orðað soleiðis, at hon í evsta føri kann veita grundarlag fyri einari eftirfylgjandi uppsøgn ella burturvísing.

Ein ávaring er á henda hátt eitt álvarsligt og víðfevnt inntriv, ið ger, at ávaringin skal lúka eitt krav um greidleika.

*Kravið um greidleika*
Kravið um greidleika merkir, at ávaringin inniheldur eina ítøkiliga lýsing av tí atburði, ið arbeiðsgevarin ikki er nøgdur við, umframt eina lýsing av, hvussu arbeiðsgevarin ynskir, at starvsfólkið bøtir um síni viðurskifti.

Kravið um greidleika merkir eisini, at ávaringin er somikið greitt og ítøkiliga orðað, at starvsfólkið veruliga hevur møguleika fyri at laga seg eftir ávaringini. Hetta merkir, at

starvsfólkið er ført fyri at vita, nær viðkomandi er innanfyri ella uttanfyri karmin av tí, ið ávaringin fyriskipar.

Í frágreiðingini frá Tórshavnar kommunu til mín, dagfest 7. juni 2023, verður tikið samanum soleiðis fyri grundgevingini fyri ávaringini, dagfest 17. januar 2023, ið er grundað á hoyringarskrivið um ávaring, dagfest 8. november 2022. Fyri at gera tað greitt, havi eg sett punktini í nummarrað:

1. A hevur víst ein ódámligan og óvirðiligan samskiftishátt mótvegis B. Tórshavnar kommuna hevur álagt B at leiða og fordeila arbeiðið ..., harumframt halda eitt neyvari eyga við tímaskrásetingunum.
2. A virðir og góðtekur ikki, at B hevur fingið til uppgávu at leiða og fordeila arbeiðið ... Hann hevur beinleiðis sagt við B, at hann ikki megnar sítt arbeiði. Hetta hevur hann sagt, meðan tekniski stjórin var til staðar.
3. Harumframt hevur A áhaldandi sýtt fyri at gera sítt arbeiði, um hann ikki fær teir tímar, hann sjálvur hevur skrásett sær, hóast hann hevur fingið at vita, at hann bara skal skráseta tímar, hann hevur arbeitt, og yvirtímar skulu bara verða skrásettir, um teir eru álagdir av B eins og tað eisini framgongur av sáttmálanum. Hesi boðini aktar hann ikki og gongur sostatt á odda fyri, at gera ímóti tí leiðslan hevur álagt.
4. Ein meir orsøk til, at Tórshavnar kommuna metti, at A skuldi hava eina ávaring var, at hann eisini er álitisumboð.

Til punkt 1: Í skjalatilfarinum, ið eg havi fingið útflýggjað, og sum knýtir seg til tíðarskeiðið áðrenn hoyringarskrivið um ávaring, dagfest 8. november 2022, dugi eg at síggja umstøður, sum í ávísum føri kunnu tykjast at hava samband við innihaldið. Tó haldi eg, vísandi til at ein ávaring er eitt álvarsligt og víðfevnt inntriv, at Tórshavnar kommuna í ávaringini, dagfest 17. januar 2023, átti at greitt nærri frá, á hvønn hátt ella undir hvørjum umstøðum samskiftishátturin hevur verið ódámligur og óvirðiligur.

Til punkt 2: Vísandi til tað, ið eg havi ført fram undir punkt 1, haldi eg, at Tórshavnar kommuna í ávaringini, dagfest 17. januar 2023, átti at greitt nærri frá, á hvønn hátt ella undir hvørjum umstøðum A ikki hevur virt ella góðtikið leiðslurættin hjá B. Útsøgnin um B verður viðgjørd niðanfyri í brotinum "*Lýdnisskyldan*".

Til punkt 3: Vísandi til tað, ið eg havi ført fram undir punkt 1, haldi eg, at Tórshavnar kommuna í ávaringini, dagfest 17. januar 2023, átti at greitt nærri frá, á hvønn hátt ella undir hvørjum umstøðum A hevur sýtt fyri at gera sítt arbeiði (...).

Til punkt 4: Eg havi valt ikki at gera viðmerkingar til hendan partin av ávaringini, tí eg meti, at hann ikki er viðkomandi í mun til mína klagumálsviðgerð.

*Lýdnisskyldan*
Vantandi samstarvsvilji eins og manglandi lýdni kunnu verða sakligar orsøkir til at geva einum starvsfólki eina ávaring. Reglurnar um lýdni og samstarvsvilja hjá alment settum starvsfólkum byggja á eina setanarrættarliga siðvenju, sum er galdandi fyri øll starvsfólk.

Ein arbeiðsgevari kann krevja, at starvsfólk, meðan tey eru í starvi, eru samstarvsfús og lýðin móti leiðslu og arbeiðsplássi sínum. Lýdnisskyldan er galdandi bæði í og uttan fyri arbeiðstíð.

Sum ein liður í lýdnisskylduni móti arbeiðsplássinum mugu starvsfólk metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Hetta skal tó verða gjørt

á ein sømiligan hátt, og uttan at nýta ein ov harðan ella grovan málburð, sum kann skaða viðurskiftini á arbeiðsplássinum.

Hetta samsvarar eisini við framsøgufrælsið hjá starvsfólki, ið eins og hjá øðrum er vart sambært § 77 í Grundlógini (Lov nr. 169 af 5. juni 1953 om Danmarks Riges Grundlov).

Ein grundleggjandi partur av lýdnisskylduni hjá starvsfólki er, at um starvsfólk vilja gera vart við viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum ikki eru nøktandi, skulu starvsfólk í fyrsta lagi venda sær til leiðsluna, soleiðis at leiðslan fær høvi at meta um málið og rætta møgulig mistøk og feilir.

Sambært ávaringini, dagfest 17. januar 2023, og frágreiðingini frá Tórshavnar kommunu, dagfest 7. juni 2023, hevur A sagt við B, at hann ikki megnar sítt arbeiði, meðan tekniski stjórin hjá Tórshavnar kommunu var til staðar. Havnar Arbeiðarafelag viðurkennir í sínari klagu, dagfest 11. mai 2023, at útsøgnin í høvuðsheitum er sonn.

Soleiðis sum útsøgnin er endurgivin, havi eg ikki grundarlag fyri at siga, at útsøgnin hevur verið ósømilig. Harafturat havi eg ikki grundarlag fyri at siga, at útsøgnin ikki er søgd á røttum stað, vísandi til, at útsøgnin er endurgivin sum stílað yvirskipaðu leiðsluni hjá A, t.e. B og tekniska stjóra hjá Tórshavnar kommunu. Onki er endurgivið um, at onnur starvsfólk enn tey, ið eru endurgivin, vóru til staðar í sambandi við útsøgnina.

*Samanumtikið*
Samanumtikið haldi eg, at avgerðin um ávaring, dagfest 17. januar 2023, ið er grundað á hoyringarskrivið um ávaring, dagfest 8. november 2022, ikki lýkur kravið um greidleika.

Eisini haldi eg, at Tórshavnar kommuna, í sambandi við ávaringina, dagfest 17. januar 2023, ikki hevur víst á slík faktisk viðurskifti, ið geva mær orsøk at halda, at A hevur brotið sína lýdnisskyldu.

At A er álitisumboð, hevur ikki ávirkan á tað, ið eg havi ført fram omanfyri.

Eg skal viðmerkja, at tá ávaringin, dagfest 17. januar 2023, er grundað á hoyringarskrivið, dagfest 8. november 2022, havi eg ikki viðgjørt ella tikið støðu til viðurskifti, sum í skjølum og frágreiðingum eru lýst at vera hend aftaná 8. november 2022.

Vísandi til mínar viðmerkingar omanfyri, fari eg at heita á Tórshavnar kommunu, um at endurskoða avgerðina at geva A eina ávaring.

Eg fari eisini at biðja Tórshavnar kommunu um at lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður